## PSV er meistari

Í gjár fall avgerðin um gullið í hollendsku fótbóltskappingini, og endin var, at PSV úr Eindhoven vann meistaraheitið. AZ Alkmar lá best fyri og kundi sjálvt avgera alt, men liðið tapti 3-2 á heimavølli. Ajax lá síðani til at vinna gullið, og við einum 2-0 sigri á Willem II lá liðið úr Amsterdam best fyri. Men so kom PSV sum eitt skot og vann heili 5-1 í sínum dysti. Endin var, at PSV vann meistaraheitið við einum máli betri enn Ajax í málmuninum.



## Atli vann sjónvarpsdyst

Atli Danielsen var sunnudagin at síggja í donskum sjónvarpið. TV2 Sport sendi beinleiðis frá dystinum millum Frem og Næstved, og Atli og teir vunnu 1-0. Dysturin var rímiliga javnur, og heimaliðið fekk einasta málið í dystinum í seinna hálvleiki. Atli Danielsen spældi væl á miðvøllinum, og serliga í seinna hálvleiki var hann sjónligur. Næstved fekk eitt mál kolldømt fyri rangstøðu móti endanum av dystinum.




*Talan var um høga leikferð, nógv trýst og stórt undirhaldsvirði, tá EB/Streymur sunnudagin tók øll trý stigini í Klaksvík*

*Mynd: Sofus Debes Johannesen*

KÍ – EB/Streymur 1-2 (0-2)

# Framúr undirhald í Klaksvík

*KÍ*

*EB/Streymur*

**Leikferðin var øgilig, málmøguleikarnir nógvir og á tunnilshaldinum fingu áskoðararnir undirhald fyri allar pengarnar. EB/Streymur skuldi hevna tapið á seinasta leikdegi í fjør og tað megnaðu teir eisini**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Lagið var gott á viðhaldsfólkunum kring vøllin á Djúpumýru í Klaksvík undan dystinum í gjár. Eftir dystin var lagið betri á teimum vitjandi fjepparunum uppaftur betri. Teirra lið hevði hevnt tapið í 27. leikumfari í fjør, tá Paul Clapson buldraði eitt langskot í kassan og sendi EB/Streym eitt pláss niður eftir stigatalvuni.

Paul Clapson skoraði eisini móti sundalagsmonnum í gjár, men undan honum høvdu sundalagsmenn skotið tvey mál.

Fyrsta málið syrgdi Sorin Anghel fyri longu í triðja minutti. Bólturin varð fluttur niðan í vinstru síðu, og við høvdinum spældi Hanus Eliasen Sorin Anghel leysan. Kviki rumenin rak inn í brotsteigin, sneiddi framvið einum leikara og legði bóltin flatt inn við handaru stong.

Næsta málið í dystinum og tað síðsta hjá EB/Streymi, kom tá hálvur tími var spældur. Egil á Bø sneiddi eitt frísparksinnlegg frá miðvøllinum víðari inn í brotsteigin, men bólturin tók í ein klaksvíking á vegnum og endaði í málinum.

Málið hjá heimaliðnum kom inni í sjálvari yvirtíðini. Tað líktist nógv seinna málinum hjá EB/Streymi, tí eisini í hesum førinum var talan um eina frísparkssending frá miðvøllinum. Bólturin endaði hjá Paul Clapson, sum minkaði um munin.

### Frálíkt fyrra umfar

Stutt eftir málið frá Sorin Anghel var um reppið, at Gunnar Nielsen javnaði fyri KÍ, men René Tórgarð stórbjargaði skotroyndini eftir innlegg úr vinstru síðu.

Ein øgilig byrjan, sum boðaði frá einum góðum dysti. Tað gjørdist tað sanniliga eisini. Leikferðin var ógvuliga høg, spælið gekk skjótt aftur og fram og tað treyt ikki við málmøguleikum. Spælið gekk skjótt aftur og fram, menn vóru grammir og bæði liðini spældu góðan og undirhaldandi álopsfótbólt. Lat tað vera sagt, at gestirnir vóru betra liðið í fyrra, men klaksvíkingar áttu sín stóra part av, at fyrstu trý korterini vóru so undirhaldandi.

### Trýst uttan úrslit

Klaksvíkingar komu best frá byrjan í seinna hálvleiki, men EB/Streymur fekk fyrsta stóra møguleikan, tá Hans Pauli Samuelsen krúllaði seg ígjøgnum í vinstra borði, brúkti Sorin Anghel sum banda og skeyt so bóltin framvið Meinhard Joensen. Ólukkutíð fyri víkarmannin bjargaði ein verjuleikari á strikuni.

Men klaksvíkingar vóru betri fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, og teir komu so nær sum teir yvirhøvur kundu koma, tá Paul Clapson sendi bóltin á stongina, eftir innlegg frá innskifta Høgna Madsen.

Hóast grammari, so riggaði tað ikki heilt hjá KÍ hesa løtuna. Besta dømi um tað var, tá teir í einum kontraálopi vóru fýra móti trimum, men onkursvegna megnaðu at klossa bóltin aftur um baklinjuna. Rætt og slætt ikki nóg gott, tá liðið er aftanfyri við tveimum málum.

### Satsa ov seint

Miðskeiðis í seinna hálvleiki dovnaði dysturin nakað. Onkrir kjansir vóru tó, har serliga eitt kanónskot frá KÍ var sera vandamikið. Móti endanum á dystinum fekk KÍ aftur lagt eitt hampiligt trýst á EB/Streym. Orsøkin var, at gestirnir nú høvdu slept speedaranum. Tilvitað ella ikki, so er tað ongantíð snilt at gera tílíkt. Í hesum førinum gav tað eitt mál til KÍ, tá teir í yvirtíðini skoraðu.

Sæð yvir allan dystin, eftir spælbýti og málmøguleikum var sigurin til EB/Streym í lagi. KÍ kom hampiliga væl aftur í dystin, men ov seint til at teir fingu stig burtur úr. Spurningurin, sum Tony Paris eigur at seta sær sjálvum, er, um teir ikki bíða ov leingi við at satsa frameftir. Í hvussu so er, er tað undrunarvert, at Heðin á Lakjuni ikki verður fluttur fram av vinstra bakki fyrr enn tað bara resta tíggju minuttir eftir.

## – Uppiborin sigur

Bárður Olsen var ikki í iva, tá vit eftir dystin spurdu hann, um sigurin var uppiborin.

– Ja, tað haldi eg. Í fyrra hálvleiki høvdu vit eina rúgvu av kjansum og vóru betri. Í seinna hálvleiki leikar meiri javnt á, og teir fáa so eitt mál til endans, men sigurin var uppiborin.

Dysturin var ikki meiri enn tríggjar minuttir gamal, tá Sorin skoraði fyri EB/Streym, og hetta metir Bárður Olsen hava avgerandi týdning fyri dystargongdina.

– Góða byrjanin var øgiliga týdningarmikil hjá okkum. Tað fekk menninar veruliga í gongd, og so skoraðu vit eisini til 2-0 tíðliga, staðfestir Bárður Olsen, sum fegnast um góðu byrjanina hjá felagsliðnum.

– Nú liggja vit nummar eitt, og tað skulu vit helst gera nakrar dystir aftrat, tí vit ætla okkum allan vegin í ár, segði fegni Bárður Olsen.

## – Óheppið at vit ikki javna

Meinhard Joensen sigur, at málið hjá Sorin Anghel oyðilegði nógv fyri teirra upplegg til dystin.

– Tað var ein ótrúliga óheppin byrjan fyri okkum, og taktiska uppleggið fer fyri skeyti tá. Men teir vóru betri at byrja við, kontraálop teirra riggaðu væl og tað var trupult hjá okkum, greiðir Meinhard Joesen frá.

Í seinna hálvleiki kom KÍ munandi betur frá byrjan, og KÍ-málverjin greiðir soleiðis frá, hvussu tað bar til.

– Spæla vit ikki væl, so má innsatsurin vera í lagi og tað var hann í seinna hálvleiki, har eg haldi vit vóru óheppnir ikki at javna, sigur Meinhard Joensen.